# – Cool at fáa nýggjan skúla

**Skúlabørnini í Kvívík gleða seg til tann nýggja skúlan. Tað ger 10 ára gamla Halla eisini. Men hon heldur, at lærararnir ikki altíð noyðast at vera so strangir**

SKÚLAFRAMTÍÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Eg spæli oftast við Rúnu, sigur Halla Karstinsdóttir sum situr aftan fyri á súkluni hjá Rúnu Reginsdóttir. Ein onnur genta, Marjun Haraldsen stendur aftanfyri súkluna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Um slakar tríggjar vikur verður nýggi skúlin í Kvívík tikin í nýtslu. Børnini hava við spenningi sæð fram til henda dagin – eisini Halla Karstinsdóttir.

Tey eru tó ikki sloppin so nær nýggja bygninginum enn, tí talan er um arbeiðsøki. Og tá hava hvørki børn ella vaksin atgongd til staðið.

Niðan í skúlagarðin leita tey sær kortini av og á – eisini eftir loknan skúladag fyri at forvitnast. Eisini mánadagin í hesi vikuni, tá veðrið var av tí allarbesta.

Halla sat á súkkluni hjá Rúnu, og saman flentu tær og hugnaðu sær í skúlagarðinum.

– Vit eru øgiliga spent uppá tann nýggja skúlan, sigur Halla.

Hon eigur eina yngri systur, sum eisini gongur í skúla. Tað er Monika, sum gongur í 2. flokki.

- Men so eigi eg eina systir aftrat. Hin eitur Palma, og hon fer í skúla aftaná summarfrítíðina, sigur Halla við einum brosi á kinn.

## Góður skúlagarður

Halla Karstinsdóttir spældi henda mánadagin við vinkonu sína Rúnu. Í góðveðrinum vóru tær farnar á eina súkklu, og løgdu síðani leiðina inn í skúlagarðin.

Saman við hinum næmingunum hevur hon fylgt við, hvussu arbeiðið er farið fram, og hvussu tann nýggi skúlin hevur tikið form hesa seinastu tíðina.

– Eg haldi, at tað er ordiliga cool at fáa ein nýggjan skúla, sigur Halla.

Serliga gleðir hon seg til at sleppa inn í nýggja skúlagarðin sum – eftir hvat hon sjálv sigur – fer at verða útgjørdur við nógvari stuttligari útgerð, m.a. hamstarahjóli og reiggjum.

Vit kunnu fortelja henni, at innan er skúlin eisini sera væl útgjørdur. So har verða somuleiðis góðar umstøður.

## Strangir lærarar

Halla gongur í 4. flokki saman við 10 øðrum næmingum, men haraftrat er eisini 3. flokkur í flokshølunum. Flokslærari teirra eitur Tórarin Niclasen,

Tað er sjálvandi altíð ójavnt, hvussu børnum dáma at ganga í skúla – og helst eru eisini ójavnir dagar. Men henda mánadagin var so ein av teimum døgunum, har Halla illa orkaði skúlan.

Og hon hevði eisini eina orsøk til tað:

– Lærararnir eru alt ov strangir, sigur hon.

Teir duga kortini at skipa soleiðis fyri, at hon ikki altíð hevur so nógv skúlating fyri heima, men klárar sum oftast at gera tey í skúlanum.

– Best av øllum dámar mær tó at gera fimleik, sigur Halla.

## Spæla og súkkla

Aftaná skúlatíð plagar hon at spæla við ymiskar gentur, men mest við eina sum eitur Rúna. Og tær finna uppá alt møguligt.

– Onkutíð spæla vit guitara, ella vit spæla okkurt annað. Og onkutíð súkkla vit eisini, sigur Halla.

Henda mánadagin í Kvívík sat hon kortini á súkkluni hjá Rúni, hóast hon eigur eina súkklu heima við hús.

– Eg visti ikki av, at Rúna súkklaði tá eg møtti henni, sigur hon.

Annars hevur hon spælt hondbólt, men er nú við í skótunum í Kvívík. Hon sleppur tó ikki við á stóru landsleguna í Danmark í summar, tí hon ikki er nóg gomul at fara við.

# Fýra mánaðir fyri tíðina

**Tað hevur gingið uppá stás við byggingini av nýggja skúlanum í Kvívík. Hann skuldi verða liðugur í summar, men verður tikin í nýtslu longu á grækarismessu**

SKÚLABYGGING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Frá fyrsta degi hevur verið arbeitt við ídni. Tí er arbeiðið eisini liðugt fýra mánaðir fyri tíð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er eitt øgiligt virksemi kring nýggja skúlan í Kvívík.

Uttandura eru menn í ferð við at seta upp stólpar og at hampa rundanum. Innanveggja verður seinasta hondin løgd á nógv ting. Og einastaðni stendur ein maður og málar geriktini.

Arbeitt verður við fullari megi, eins og gjørt hevur verið líka síðani arbeiðið byrjaði á heysti 2003.

– Eg má bara siga, at arbeiðið hevur gingið óalmindiliga væl. Allir mans hava arbeitt ótrúliga gott, sigur stjórin í GAJ-smíð, Grækaris Joensen.

Fyritøka hansara, GAJ-smíð hevur staðið fyri byggingini, og tað verður eisini henda fyritøkan, sum í næstum fer undir at renovera tann gamla skúlan í bygdini.

At tann nýggi skúlin verður tikin í nýtslu á grækarismessu í ár, man Grækaris sjálvur vera einamest glaður fyri!

## Skal líkjast tí nýggja

Tað var í oktober mánaði í 2003 at teir byrjaðu at rigga til fyri nýggja skúlanum í Kvívík. Ein mánað seinni byrjaði útgravingin, og síðani hevur tað bara gingið við fúkandi ferð.

Nú, tann nýggi skúlin verður tikin í nýtslu 12. mars, er spurningurin hvat skal gerast við tann gamla skúlan.

Ætlanin er, at hann skal renoverast munandi, eins og gerast skal ein reising á bygningin við taki.

Sum skilst verður hetta gjørt fyri at hann skal koma at líkjast tí nýggja skúlanum.

Kostnaðurin av at byggja nýggja skúlan er einar 13 mió. kr.

## Betri pláss

Íalt er nýggi skúlin góðar 1000 fermetrar stórur, og hevur stovur og ta útgerð sum krevjast til ein skúla í dag.

Gamli skúlin, sum er fastur í tann nýggja, varð tikin í nýtslu fyri meiri enn 30 árum síðani. Hann er um 350 fermetrar stórur, og verður ikki mettur sum tíðarhóskandi í dag.

Har finst t.d. hvørki bókasavn ella høli til serundirvísing, eins og lítið pláss er til teldurnar. Men í nýggja skúlanum fáa næmingarnir munandi betri pláss til hesar lærugreinarnar og aðrar við.

Nú arbeiðið við tann nýggja skúlan er liðugt, byrjar arbeiðið við renoveringini av tí gamla fyrst í apríl mánaði.